FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Viðtøkur fyri Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetri Føroya

**Endamálið** hjá Ráði teirra lesandi (RTL) er at umboða áhugamálini hjá øllum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya í samstarvi við leiðsluna, undirvísarar og onnur starvsfólk.

## § 1 Ráð teirra lesandi

Ráð teirra lesandi (RTL) er valt av teimum lesandi árliga og verður skipað sambært reglugerð fyri ráðið (RR).

RR er skrivað av ráðnum í samráð við Setrið, og góðkend á aðalfundi. Um broytingar verða gjørdar í RR, skal hetta vera í samráð við Setrið og allar broytingar skulu góðkennast á aðalfundi – ella á eykaaðalfundi.

*Stk. 2.* RTL verður skipað av tveimum umboðum frá hvørjari deild. Nærri ásetingar verða settar í *Reglugerð fyri Ráð teirra lesandi á Setrinum.*

Verandi deildir eru:
**Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi** (DHS)
**Føroyamálsdeildin** (FMD)
**Námsvísindadeildin** (NÁD)
**Náttúruvísindadeildin** (NVD)
**Søgu- og samfelagsdeildin** (SSD)

*Stk. 3.* Harafturat er umboðið fyri tey lesandi (UL) í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya eygleiðari í RTL. Viðkomandi hevur rættin at møta á øllum fundum og rættin til at taka orðið á hesum fundum. Um einki umboð er fyri deildina hjá UL, verður viðkomandi sjálvskrivaður limur í RTL og hevur tá eisini atkvøðurætt.

*Stk. 4.* Skipanin av RTL og viðtøkur um atkvøðurætt verða ásettar í RR.

*Stk. 5.* Limir í RTL kunna fáa váttað sína luttøku í ráðnum frá Lestrarskrivstovuni.

Stk. 6. Broytingar í hesum viðtøkum krevja semju millum RTL og Setrið, umframt at tær skulu staðfestast á aðalfundi.

## § 2 Val av Ráðnum

RTL fer, við stuðli frá Lestrarskrivstovuni, at skipað fyri einum vali áðrenn 30. septembur á hvørjum ári. Hetta skal verða í samsvari við mannagongdir fyri valinum, ið eru ásettar í RR.

*Stk. 2.* Øll lesandi hava valrætt og eru valbær. Lestrarskrivstovan skal kanna valbærið hjá øllum sum stilla upp og veitir RTL yvirlit yvir lesandi við valrætti, deild fyri deild.

Stk. 3. Valið skal verða kunngjørt í seinasta lagi 3 vikur undan valdegnum. Eru fleiri enn tvey valevni frá ávísari deild, so skal vallistin verða kunngjørdur í seinasta lagi eina viku áðrenn valið.

*Stk. 4.* Tá ráðið er valt, eigur tað at skipa seg við formanni/-kvinnu, varaformanni/-kvinnu, skrivara og kassameistara. Hetta verður gjørt til fyrsta fundin eftir valið.

*Stk. 5.* Tá ráðið er skipað, eigur skipanin at verða kunngjørd alment á heimasíðuni hjá Setrinum (innan 5 yrkadagar).

*Stk. 6.* Ráðið setur síðani dagsskránna fyri sítt virksemi, ið skal verða í samsvari við endamálið lýst omanfyri.

*Stk. 7.* Lestrarskrivstovan hjálpir RTL við at samskipað tað fyrisitingarliga.

## § 3 Aðalfundir

Aðalfundur skal haldast árliga, í samsvari við RR.

*Stk. 2.* Aðalfundurin eigur at verða hildin í septembur á hvørjum ári.

*Stk. 3.* Øll lesandi skulu bjóðast við til aðalfundin og innbjóðingin eigur at verða send teimum í minsta lagið 3 vikur áðrenn aðalfundin.

*Stk. 4.* Skráin skal verða kunngjørd í minsta lagi 2 vikur áðrenn aðalfundin.

Stk. 5. Til ber at kallað inn til eykaaðalfund í gjøgnum árið, um hóskandi grundgeving er fyri tí.

## § 4 Ráðsfundir

RTL skal fundast javnan og eigur at hava í minsta lagi 4 fundir um árið. Ráðið hevur tó ikki skyldu at møta til fund í ferium (heystferiu, jólaferiu, páskaferiu ella summarferiu). Nágreiniligari mannagongd fyri fundir verður ásett í RR.

*Stk. 2.* Fundarfrágreiðing eigur at verða fyri hvønn fund og tryggjast skal at framtíðar ráð hava fulla atgongd til tær. Fundarfrágreiðingar skulu ikki innihalda viðkvæmar ella persónligar upplýsingar.

*Stk. 3.* Ein útgáva av fundarfrágreiðingini eigur at verða almenn og øll lesandi eiga at verða gjørd var við, at tær eru tøkar.

*Stk. 4.* Allar niðurstøður, semjur ella avgerðir eiga at verða noteraðar í fundarfrágreiðingini.

*Stk. 5.* Um atkvøtt var til fundin eigur hetta at verða noterað í fundarfrágreiðingini – umframt úrsliti av atkvøðuni.

## § 5 Samstarvsfundir við Setrið

RTL ferð at støðugt at samstarva við Setrið á skipaðan hátt, í samsvar við endamálið hjá RTL. Mannagongdir fyri hetta samstarv eru ásettar í leiðreglunum fyri samstarvfundirnir.

*Stk. 2.* Samstarvið eigur at dekkað øll viðkomandi al og báðir partar kunnu leggja fram mál til viðgerðar.

*Stk. 3.* Báðir partar hava eisini rætt til at kallað inn til serligar samstarvsfundir, skuldi hetta verið neyðugt.

## § 6 Árlig frágreiðing

Við byrjanina av hvørjum lestrarári, eigur RTL at leggja fram eina árliga frágreiðing, ið skal verða tøk fyri lesandi og starvsfólk á Setrinum. Grundleggjandi leiðreglur fyri hesa frágreiðing og hvussu hon verður lýst eru ásettar í RR.

*Stk. 2.* Frágreiðingin skal verða løgd fram á aðalfundi á hvørjum ári.

*Stk. 3.* Frágreiðingin eigur at innihalda kunning um ráðið og virksemi tess undanfarna árið.

*Stk. 4.* Formaðurin/-kvinnan fyri RTL hevur ábyrgdina av at tryggja, at frágreiðingin verður fullfíggjað og lýst.

## § 7 Arbeiðsøki

RTL eigur at verða hoyrd um øll mál, ið eru viðkomandi fyri tey lesandi á Setrinum, har í millum:

1. Meginreglur og mannagongdir fyri upptøku av lesandi
2. Broytingar í mannagongdum fyri menning, góðtøku og tillaging av útbúgvingum, har í millum góðskuviðgerð og afturboðan frá lesandi
3. Stovnan av nýggjum útbúgvingum
4. Trivnaðarkanningar og -átøk
5. Innleiðsla og kunning fyri nýggjum lesandi

*Stk. 2.* RTL kann eisini, av sínum eintingum, ella í samstarvi við Setrið, skipað fyri hóskandi sosialum og mentanarligum tiltøkum fyri teimum lesandi, ella øðrum viðkomandi tiltøkum.

*Stk. 3.* RTL skal viðgera tey mál, ið tey lesandi leggja fram. Nágreiniligari ásetingar fyri, hvussu mál verða løgd fram fyri RTL og hvussu tey verða viðgjørd av RTL, eru ásettar í RR.

*Stk. 4.* Setrið kann heita á RTL at viðgera ávís mál og RTL hevur rætt til at samráðast við Setrið um mál viðvíkjandi útbúgvingum, lestrarumhvørvi og nøgdsemi millum tey lesandi.

*Stk. 5.* Harafturat kann RTL viðgera mál, ið hava ein almennan áhuga fyri Setrið.

*Stk. 6.* Avgerðir, tilráðingar og niðurstøður, ið RTL hevur gjørt, skulu verða tøkar hjá teimum lesandi og starvsfólki á Setrinum, Hetta kann vera sum partur av fundarfrágreiðingum hjá RTL, ella í øðrum hóskandi formati.

*Stk. 7.* RTL eigur ikki at geva sín áskoðan um serstøku viðurskiftini hjá einstøkum lesandi og viðger ikki persónsmál.

## § 8 Fígging og útreiðslur

RTL fær tillutað ávísa upphædd á hvørjum ári, ið skal brúkast til teirra virksemi. Upphæddin verður sett í samráð við Setrið og eigur at verða staðfest áðrenn 1. februar á hvørjum ári.

*Stk. 2.* RTL hevur skyldu at halda roknskap, ið skal leggjast fram fyri Setrið, um Lestrarskrivstovuna, áðrenn upphæddin fyri komandi árið verður ásett.

Stk. 3. Øll nýtsla av tillutaðu upphæddini skal fylgja ásetingum og mannagongdum á Setrinum.

*Stk. 4.* Lestrarskrivstovan kemur at virka sum millumliður vegna RTL og kann góðkenna útgjøld frá tillutaðu upphæddini. Lestrarskrivstovan vendir sær til fyrisitingarstjóra og/ella rektara í ivamálum.

*Stk. 2.* Fyri luttøku á ráðsfundi verður limur í RTL samsýntur við 250,-. Tó kann eingin limur fáa meira enn 2500,- árliga. Nærri mannagongdir fyri útgjaldi verða ásettar í RR.

**§ 9 Annað virksemi**

RTL hevur rætt til at samstarva við aðrar lestrarfelagsskapir, ið eru viðkomandi fyri teirra endamál.

Soleiðis viðtikið av leiðsluni á Setrinum og Ráði teirra lesandi.
Hesar viðtøkur koma í gildi beinanvegin.

Mars 2021
Fróðskaparsetur Føroya

Sonni Johnsson

**Sonni Oddbjørn Johnson**
Formaður fyri Ráð teirra lesandi

**Chik Collins**
Rektari á Fróðskaparsetri Føroya